# Mín besta **uppskrift**

**LAGT TIL RÆTTIS:** Inna Törnroos



**UPPSKRIFT:** Ada Horn

## Jóla do'nuts (uml. 25 stk)

**Í staðin fyri kleynir ella holukøkur, skuldi tú onkuntíð roynt at kóka doughnuts til jólar. Hesar eru bara nammi nammi lekrar og og øgliga lættar at gera. Og so rigga tær fínt at frysta, men sum oftast eru allar etnar, áðrenn tær eru kólnaðar**

| | |
|---|---|
| 650 g | av hveitimjøli |
| 125 g | av smøri ella margarin |
| 75 g | av sukuri |
| 2 | egg |
| 50 g | av ger |
| 3 dl | av lunkaðari mjólk |
| 1/2 tsk | salt |
| 1 tsk | flótandi kardemummu |
| | Palmin ella olju at kóka í |



Morla smørið í mjølinum og koyr sukur, salt og kardemummu í. Loys gerina upp í lunkaðu mjólkini og koyr í mjølblandingina saman við eggunum. Elt deiggið til tað er blankt og set at ganga í 30 minuttir.

Rulla deiggið út í uml. 1 cm tjúkd stikk uml. 25 flatar rundingar út við einum miðalstórum glasi. Trýst ein fingur ígjøgnum rundingarnar til hol. Tað ber eisini til at trilla deiggið til smáar bollar og stinga fingurin ígjøgnum til hol.

Lat ganga aftur í eini 15 minuttir, meðan tú hitar palmin ella olju í eini grýtu, ikki ov stórari. Feittið er nóg heitt, tá tað sjóðar um ein svávulpinn.

Kóka tríggjar til fýra doughnuts í senn, til teir eru ljósabrúnir - á leið ein til tveir minuttir á hvørjari síðu. Tak teir upp og legg teir á køkspappír. Stroy teir við flormelis ella smyr glasur á, til dømis kakaoglasur við onkrum kakupynti.

Tú kanst eisini bara eta teir, sum teir eru við súltutoy og flormelis

### MÍN BESTA UPPSKRIFT

er nýggjur teigur í Vikuskiftis Sosialinum, har lesarin kann senda okkum sína bestu uppskrift, saman við mynd av rættinum og navni á kokkinum.

Øll sløg av uppskriftum eru vælkomnar, bæði bakstur, matur og drekka, men tær skulu ikki hava verið almannakunngjørdar áður.

Send tína bestu uppskrift til:
**Sosialurin**
**Postboks 76**
**FO-110 Tórshavn**
**mrk. uppskrift**

Ella til post@sosialurin.fo.

Uppskriftin, sum verður prentað í blaðnum, fær *gávukort á kr. 300,-* frá **Thomas Dam búnýti**



Thomas Dam búnýti

TÓRSHAVN
Niels Finsensgøta 18
tel. 36 30 00

SALTANGARÁ
Heiðavegur 56
tel. 44 76 04




# Orðálvur fær væl góðkent

JÓHANNA, 45, JÓHAN KÁRI, 14 OG ODDVØR 18 HAVA ROYNT NÝGGJA FØROYSKA BORÐSPÆLIÐ **»ORÐÁLVUR«**. TEY GEVA SPÆLINUM VÆLGÓÐKENT VIÐ HEILUM SEKS STJØRNUM AV SEKS

★★★★★★

**UMMÆLI**

**Inna Tørnroos**
inna@sosialurin.fo

Jóhanna Vang og børnini Oddvør og Jóhan Kári hava fordjúpað seg í nýggja mállæruspælið »Orðálvur«.

Spælið er uppbygt á nøkulunda sama hátt sum vælkenda *Trivial Pursuit.*

Kristianna Poulsen og Rannvá Skeel Johannsen hava ment spælið og greiða soleiðis frá, hvussu ein skal spæla Orðálv.

– Spælið eitur Orðálvur, og hann er ein lítil føroyskur álvur, sum býr á oynni Orðoy, og tá vit spæla, eru vit gestir á hansara oyggj. Hann hevur gjørt ein veg allan vegin niðan á tindin, sum vit ferðast eftir, og á vegnum spyr hann okkum spurningar. Tá vit so eru komin niðan á tindin, áttu vit at dugað rættiliga nógv um navnorð.

Tá Jóhanna og børnini spældu, byrjaðu tey á torleikastigið eitt, men hækkaðu til stig tvey og síðan til trý.

– Dótturin, sum er 18 ár, kláraði hægsta stigið uttan trupulleikar, og sonurin uppá 14 kláraði seg eisini heilt væl á hægsta stigi, sigur Jóhanna.

Á eskuni stendur at spælið er ment fyri børn níggju ár og uppeftir. Jóhanna metur at børn mugu hava lært eitt sindur av mállæru fyri at fáa nakað burturúr.

Spælið er gjørt so, at bæði tey veikastu og sterkastu innan mállæru skulu kunnu kappast og er á tann hátt eitt perfekt familjuspæl.

## Tríggjar bøkur til tríggjar aldrar




**Hvar er Flekk?**
Fitti, guli hundurin Flekk ger aftur um seg. Bókin er til tey minstu børnini 0-2 ár.

**Mín Jólabók**
Snotulig barnabók við søgum, hugskotum og íblástri til hugnaligar løtur heima fyri alla familjuna.

**Skýming**
Bókin øll tosa um, *Twilight*, er nú týdd til føroyskt. Hon snýr seg um ómøguliga kærleikan millum gentuna Bellu og vampýrin Edvard. Jú, meira Bella nærkast Edvard, størri verður vandin fyri at hon kemur bæði sær sjálvari og øðrum í óføri. Ein spennandi søga sum fangar.